# LISTALEYPURIN

SKÚLAÁRIÐ 13–14



# TILBOÐ SKÚLAÁRIÐ 13–14:

DUKKULEIKURIN **VEIÐA VIND** ........ s. 4
1.–31. oktober 2013

VERKSMIÐJAN **DIGITALAR SØGUR** ........ s. 6
4.–13. november 2013

VERKSMIÐJAN **BREAKDANSUR** ........ s. 8
25.–29. november 2013

VERKSMIÐJAN **SKRIVING OG SNIÐGEVING** ........ s. 10
Januar/februar 2014

VERKSMIÐJAN **MYNDPRÝÐING** ........ s. 12
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá 6. januar til páska

BARNAKONSERT VIÐ **SVØBSK** ........ s. 14
7.–13. februar 2014

KONSERT VIÐ **DÁNJALI** ........ s. 16
17.–21. februar 2014

SJÓNLEIKUR VIÐ **TEATERIET APROPOS** ........ s. 18
17.–21. og 24.–27. februar 2014

SANGLEIKURIN **HARLEKIN** ........ s. 20
22.–28. apríl 2014

A CAPPELLA KONSERT VIÐ **BARZANGBAR** ........ s. 22
28. apríl–2. mai 2014

# LISTALEYPURIN
# **SKÚLAÁRIÐ 13–14**

Listaleypurin er mentanarlig verkætlan, sum Norðurlandahúsið, Kommunusamskipan Føroya og Føroya kommunufelag skipa fyri við stuðli frá Mentamálaráðnum. Endamálið er at geva fólkaskúlanæmingum og forskúlanæmingum høvi at uppliva góða yrkislist.

Dentur verður lagdur á at røkka ymsum aldursbólkum og at spjaða listavitjanir um alt landið. Tær vitjanir og framsýningar, ið Listaleypurin bjóðar, eru ókeypis hjá skúlum í luttakandi kommunum.

Tilboðini í Listaleypinum eru eitt úrval, sum ein nevnd við umboðum frá skúlaverkinum og listaheiminum hevur gjørt út frá umsóknum, sum listafólk hvørt ár kunnu senda inn fyri at vera við.

Í januar 2013 legði avstralski granskarin, Anne Bamford, fram kanningina „List í uppvøkstri og skúlagongd í Føroyum". Kanningin undirstrikar, at listafrálæra mennir trivnað og læring, og at skúlaverk, listafelagsskapir og nærumhvørvi eiga at samstarva um hetta. Listaleypurin verður nevndur sum gott dømi. Anne Bamford mælir til, at hann átti at vaksið seg størri og vísir á, at næmingar tykjast at fáa mest burturúr, tá teir eru virkin partur av upplivingini. Kanningin kann bíleggjast ókeypis á www.snar.fo og liggur eisini teldutøk á www.listaleypurin.fo.

Vit hava lurtað eftir Anne Bamford og hava tikið fleiri interaktiv tilboð við í faldaran í ár. Heitt verður á lærarar og leiðslur um at geva sær stundir til fyrireiking og at fylgja upp eftir vitjanina, so at upplivingin við Listaleypinum verður partur av frálæruni.



# LISTAGREIN: **DUKKULEIKUR**

**Heiti:** Veiða vind.

**Listafólk:** Karavella Marionett-Teatur við Rakel Helmsdal.

**Málbólkur:** Forskúli og 1.–3. flokkur. Áskoðaratal valdast høli, tó í mesta lagi 60.

**Longd:** Uml. 30 minuttir + uml. 1 skúlatími aftaná.

**Fyrireiking:** Fyrireiking er ikki neyðug, men stuttligt hevði verið, um næmingarnir áðrenn høvdu spælt sær við orðamisskiljingar, (smbr. veiða hind – veiða vind).

**Krøv:** Eitt væl myrkalagt rúm, nóg stórt til eitt dukkuleikhús á 2 x 0,85 metrar umframt pláss til áskoðarar. Flestu skúlastovur rigga til endamálið, um borð og stólar verða tikin út. Til ber at myrkaleggja við at heingja t.d. svart plast ella toy væl upp fyri vindeyguni.

**Tíðarskeið:** 1.–31. oktober 2013.




NÆSTAN 4.000 BØRN HOYRDU KONSERTINA HJÁ FØROYA SYMFONIORKESTRI Í 2011, OG NÚ SLEPPA TEY AT SÍGGJA SØGUNA UM LÍTLABEIGGJA, SUM FER ÚT AT VEIÐA VIND OG MØTIR ÆVINTÝRINUM EIN VEÐURSKIFTANDI APRÍLDAG. LEIKURIN LIGGUR TÆTT UPP AT BÓKINI EFTIR KÁRA BÆK, RAKEL HELMSDAL OG JANUS Á HÚSAGARÐI. LEIKURIN NÝTIR TÓNLEIKIN, SUM SYMFONIORKESTRIÐ SPÆLDI, OG BÚNAR OG PALLUR ERU SPUNNIR EFTIR MYNDUNUM Í BÓKINI, MEN SØGAN BROYTIST SJÁLVSAGT, TÁ LEIKARARNIR KOMA Á PALLIN. EFTIR SÝNINGINA VERÐUR LAGT UPP TIL PRÁT UM HUGFLOG, ORÐASPÆL OG KREATIVAR MISSKILJINGAR.

LISTAGREIN:
# DIGITALAR SØGUR

**Heiti:** Digitalar søgur – lær at gera tína egnu søgu til film.

**Listafólk:** Digital Storylab – les meira á www.digitalstorylab.com.

**Málbólkur:** 4.–10. flokkur.

**Longd:** Verksmiðja á 4–5 tímar.

**Fyrireiking:** Næmingar kunnu á einum geyma hava við sær tekningar, myndir og/ella videoklipp av sær sjálvum, familjuni, vinum, kelidýrum, húsunum ella onkrum ítrivi, sum hevur teirra áhuga.

**Krøv:** Minst ein telda til hvørjar tveir næmingar.

**Tíðarskeið:** 4.–13. november 2013.

Kom inn í eina livandi miðlasmiðju, har digitalar søgur verða framleiddar og deildar millum næmingarnar. Síggj søgudømi og fá íblástur á http://digitalstorylab.23video.com.





FORTEL TÍNA EGNU DIGITALU SØGU Á NETINUM! Í HESI VERKSMIÐJU LÆRA NÆMINGAR AT GERA DIGITALT TILFAR TIL SMÁAR FILMAR Á 2–3 MINUTTIR. VIT GEVA TEIMUM INNLIT Í AT:

- GERA STORYBOARD
- SKRIVA HANDRIT
- HUGSA KREATIVT
- KLIPPA FILM OG TÓNLEIK

NÆMINGARNIR ARBEIÐA SAMAN TVEIR OG TVEIR OG LÆRA AT NÝTA FORRITIÐ MOVIEMAKER ELLA PHOTOSTORY, HAR TEIR ARBEIÐA VIÐ MYNDUM, VIDEO, LJÓÐI, TEKSTI, TÓNLEIKI OG EFFEKTUM. NÆMINGARNIR RÁÐA SJÁLVIR FYRI, HVAT SØGURNAR SKULU SNÚGVA SEG UM.

# LISTAGREIN: **BREAKDANSUR**

**Heiti:** Beat Street.

**Listafólk:** Freestyle Phanatix við Egil Cebrero Løberg og Daniel Grundström.

**Málbólkur:** 4.–10. flokkur. Í mesta lagi 80 næmingar til verksmiðjupartin.

**Longd:** Verksmiðja, 1 skúlatími. Frágreiðing og framførsla, 30 minuttir.

**Fyrireiking:** Næmingar og lærarar kunnu lesa um mentanarsøguna hjá hiphop. Finn spennandi leinki á www.listaleypurin.fo.

**Krøv:** 1,5 m$^2$ gólvpláss til hvønn næming í verksmiðjuni. Gott ljóðanlegg við møguleika fyri at seta iPod til. Gólvið má hóska til dans, tað vil siga vera úr viði, linoleum ella tílíkum, og hol og rivur mugu ikki vera. Betong og teppi kunnu ikki brúkast.

**Tíðarskeið:** 25.–29. november 2013.



» HVÍ FARA ÚT AT SPÆLA, TÁ PLAYSTATION OG SJÓNVARP ERU Á KAMARINUM, OG ALLIR VINIRNIR ERU Á NETINUM? VERKSMIÐJAN HJÁ FREESTYLE PHANATIX VIL KVEIKJA NÆMINGARNAR TIL EITT LÍV VIÐ DANSI OG RØRSLUM.

INNIHALD:

- VERKSMIÐJA VIÐ BREAKDANSI OG STREETDANSI
- PRÁT UM MENTANARVIRÐINI Í HIPHOPDANSI OG STREETDANSI
- LÍTIÐ SHOW VIÐ VEGLEIÐARUNUM

SÍGGJ OG LES MEIRA Á HTTP://PHANATIX.NET/WORKSHOPS.

LISTAGREIN:
# SKRIVING OG SNIÐGEVING

**Heiti:** Orð og litir.

**Listafólk:** Katrina í Geil og Rakel Helmsdal.

**Málbólkur:** 6. og 7. flokkur. Møguliga 5. flokkur, um tey skriva væl.

**Longd:** 135 minuttir + framsýning í skúlanum í minst 14 dagar + framsýning í Mentamálaráðnum.

**Fyrireiking:** Avvarðandi lærari undirvísir í teoretiskari og praktiskari litlæru. Vegleiðing um hetta verður givin áðrenn.

**Krøv:** Evningarstova, har friður kann vera, meðan verksmiðjan verður hildin.

**Tíðarskeið:** Januar/februar 2014.





» TVØRFAKLIGA VERKSMIÐJAN GEVUR NÆMINGUNUM INNLIT Í HANDVERKINI AT SKRIVA OG AT SNIÐGEVA. ARBEITT VERÐUR VIÐ, HVUSSU ORÐ, LITIR OG SKAP ÁVIRKA HVØRT ANNAÐ OG BROYTA TÝDNING, ALT EFTIR HVUSSU TEY VERÐA SETT SAMAN. NÆMINGARNIR FÁA VÍÐKAÐA VITAN UM TÝDNINGIN AV ORÐUM OG LITUM, FÁA INNLIT Í FAKLIGAR ARBEIÐSGONGDIR OG ERU VIÐ Á TVEIMUM FRAMSÝNINGUM, HARAV ONNUR ER UTTAN FYRI SKÚLANS ØKI.

# LISTAGREIN:
# **MYNDPRÝÐING**

**Heiti:** At myndprýða skúlabøkur.

**Listafólk:** Janus D. Guttesen, teknari.

**Málbólkur:** 8.–10. flokkur, 15–30 næmingar.

**Longd:** 4 dagar.
**1. dagur:** Kunning um verkætlanina, 1 tími.
**2. dagur:** Vit gera layout til tekst og tekningar, 2 tímar.
**3. dagur:** Vit tekna skitsur, 3 tímar
**4. dagur:** Vit reintekna og leggja litir á tekningarnar við teldu, 3–5 tímar.

**Fyrireiking:** Lærarin býtir flokkin upp í bólkar við 3–4 næmingum frammanundan.

**Krøv:** Friðarligt høli við borðum. A3-pappír, svartir spritt-pennar og 5–6 teldur við tekniprogrammi, t.d. Photoshop. Teknarin útvegar talgilt teknibrettir.

**Tíðarskeið:** Mánadag, mikudag og fríggjadag frá 6. januar til páska.




» AT TEKNA TIL EINA SKÚLABÓK ER EITT SLAG AV BRÚKSLIST, OG TEKNARIN SAMSTARVAR VIÐ BÆÐI HØVUNDAN OG FORLAGIÐ. VIT ARBEIÐA Í BÓLKUM OG GERA LAYOUT, TEKNA SKITSUR, REINTEKNA OG LITLEGGJA. VIT GERA IKKI PERFEKTAR TEKNINGAR, MEN FARA KORTINI ÍGJØGNUM ALLA PROSESSINA, OG NÆMINGARNIR UPPLIVA YMSU AVBJÓÐINGARNAR, SUM EIN TEKNARI HEVUR.

# LISTAGREIN: **FÓLKATÓNLEIKUR**

**Heiti:** Barnakonsert við Svøbsk.

**Listafólk:** Maren Hallberg, Jørgen Dickmeiss, Simon Busk og Theis Langlands, øll útbúnir fólkatónleikarar.

**Málbólkur:** Forskúli og 1.–3. flokkur, í mesta lagi 200 næmingar.

**Longd:** 1 skúlatími. Ein konsert inniheldur kunning um ljóðføri + traditionellan og nýggjan fólkatónleik við íblástri úr Norðurlondum og 3 fólkavísur við felagssangi, felagsdansi og rútmuspæli.

**Fyrireiking:** Eitt skjal við arbeiðsuppleggi til skúlar liggur til taks á www.listaleypurin.fo.

**Krøv:** Stikkkontakt til elektriskt klaver.

**Tíðarskeið:** 7.–13. februar 2014.



» BØRN ERU IKKI SO VON VIÐ AKUSTISKAN LIVETÓNLEIK LONGUR, MEN TA UPPLIVINGINA VILJA VIT GEVA TEIMUM. VIT VILJA LATA TEY VERA SAMAN VIÐ TÓNLEIKARUM, MEÐAN TEIR SKAPA INTENSITET, GLEÐI, POESI OG VILLSKAP VIÐ SÍNUM AKUSTISKU LJÓÐFØRUM. VIT BRÚKA FÁ ORÐ Í KONSERTUM OKKARA, TÍ ROYNDIRNAR SIGA OKKUM, AT TESS FÆRRI ORÐ, TESS BETUR LURTA BØRNINI. TAÐ ER UMRÁÐANDI, AT TEY BÆÐI SLEPPA AT LURTA EFTIR OG UPPLIVA TÓNLEIKIN VIÐ SJÁLV AT VERA VIÐ TIL AT SKAPA HANN. BØRNINI VERA TÍ BÆÐI PASSIVIR MÓTTAKARAR OG AKTIVIR LUTTAKARAR, SO AT TEY MERKJA, HVAT TÓNLEIKURIN GER VIÐ TEY. SVØBSK HEVUR SPÆLT OG MENT NÓGVAR BARNAKONSERTIR SEINASTU SEKS ÁRINI. HVØRT ÁR HEVUR BÓLKURIN UML. 40 SLÍKAR KONSERTIR.

# LISTAGREIN: **TÓNLEIKUR**

**Heiti:** Konsert við Dánjali.

**Listafólk:** Dánjal á Neystabø
Angelika Nielsen
Annika Jessen
Kim Nyberg
Ulrik Brohuus

**Málbólkur:** 8.–10. flokkur.

**Longd:** 45–60 minuttir.

**Fyrireiking:** Tá ið ein sýning er bíløgd, greiðir Dánjal á Neystabø læraranum frá fyrireikingunum. Í stuttum snúgva tær seg um, at flokkurin verður býttur sundur í bólkar, sum síðan skulu geva hvør sínum sangi respons við at úttrykkja seg kreativt um hann í staðin fyri at tulka analytiskt, eins og vanligt er.

**Kreativur responsur kann t.d. vera:**

1. Ein kollasja við myndum og sitatum
2. Ein yrking ella stuttsøga um sama tema
3. Ein tekning ella málningur, sum lýsir sangin ella eins egnu hugsan
4. Eitt orðaleyst tónleikaverk, sum lýsir ein stemning
5. Ein yrking, evt. sum svar upp á Dánjalsa tekst
6. Eitt annað slag av listaligum responsi

Síðan kemur bólkurin hjá Dánjali á skúlan, og saman við næmingunum verður so roynt at fáa ymisku responsirnar við í endaligu framførsluna.

Fyrireikingartilfar liggur á www.listaleypurin.fo.

**Krøv:**
- Tøknikrøv: Eitt høli við streymveiting og eitt ljóðanlegg.
- Høliskrøv: Myrkalegging er fyrimunur, men ikki krav.

**Tíðarskeið:** 17.–21. februar 2014.



VIT GEVA EINA INTERAKTIVA KONSERTUPPLIVING, SUM TEKUR STØÐI Í NÆMINGUNUM. TESSVEGNA ERU FLEIRI SANGIR GJØRDIR SUM OPIN STYKKIR, IÐ LATA SEG STÝRA AV SPONTANITETI. HARAFTURAT FÁA NÆMINGARNIR UNDIRVÍSINGARTILFAR AT ARBEIÐA VIÐ, OG BÓLKURIN ARBEIÐIR EISINI SAMAN VIÐ NÆMINGUNUM, SO AT TEIR FÁA EIN AKTIVAN LEIKLUT Í FRAMFØRSLUNI.

# LISTAGREIN:
# SJÓNLEIKUR

**Heiti:** FUCK.

**Listafólk:** Teateriet Apropos: Filippa Suenson, Kristine Elmedahl og Daniel Livbjerg Bevensee.

**Málbólkur:** 7.–10. flokkur.

**Longd:** 70 minuttir.

**Fyrireiking:** Frálærutilfar kann heintast á www.teaterietapropos.dk. Skipað kann verða fyri práti á 30–45 minuttir eftir leikin, har næmingar og lærarar kunnu tosa við listafólkini um sjónleikin, avbjóðingar í sambandi við framførsluna, upplivingar í sambandi við sexualfrálæru og annað, sum hugurin er til. Er ynski um prát, verður hetta avtalað við verkætlanarleiðaran.

**Krøv:** Eitt væl myrkalagt rúm. Stødd á spæliøki við áskoðaraplássum: minst 8x12x3 metrar (BxDxH), t.d. ein fimleikahøll ella tílíkt. Skúlin útvegar 6 metrar av borðum til aftasta áskoðararað og skaffar 10 stólar. Bólkurin útvegar beinkir.

**Tíðarskeið:** 17.–21. og 24.–27. februar 2014.



» AT GANGA SAMAN, FORELSKILSI, TÚ, EG, VIT, AT VERA NORMALUR, DREYMAR, VINIR, MØRK, KENSLUR, TRYGGLEIKI, FYRSTU FERÐ, HUMOR, SAMLEIKI, HUMØRSVINGNINGAR, VILLIR PISSILINGAR, AT FLEYGA SÆR, HOMOSEXUALITETUR, PORNO, MAKTIN HJÁ KUSUNI, FORDÓMAR, FANTASIIR, MURTAR, BOPPUR, PARADISE OG SEX … VERÐIN FLIPPAR ÚT Í UNGDÓMSÁRUNUM.

EITT STUTTLIGT ÍSKOYTI TIL VANLIGU SEXUALFRÁLÆRUNA, VIÐ DENTI Á TAÐ SUNNA SEX- OG KÆRLEIKSLÍVIÐ.

# LISTAGREIN: **SANGLEIKUR**

**Heiti:** Harlekin.

**Listafólk:** Aldubáran við Tjóðpalli Føroya.

**Málbólkur:** Forskúli og 1.–5. flokkur – eldri flokkar eru vælkomnir eftir ynski frá skúlanum.

**Longd:** Ein skúlatími.

**Fyrireiking:** Eingin fyrireiking er neyðug. Lærarar kunnu tó læra børnini um pantomimu.

**Krøv:** Stór stova ella lítil fimleikahøll, 12x6x3 metrar.

**Tíðarskeið:** 22.–28. apríl 2014





» NÚ VERÐUR AFTUR HØVI AT UPPLIVA LITRÍKA OG STUTTLIGA SANGLEIKIN HARLEKIN, SUM HUGTÓK FJØLD AV BØRNUM OG VAKSNUM Í FJØR. LEIKARARNIR HAVA NEVNILIGA FUNNIÐ LJÓÐFØRINI OG DANSISKÓGVARNAR FRAM AFTUR OG ERU KLÁRIR AT UNDIRHALDA OKKUM. SØGAN UM HARLEKIN SNÝR SEG Í STUTTUM UM, HVUSSU LEIKUR FÓR, TÁ IÐ TÆNARIN, HARLEKIN, FEKK SÍN EYÐKENDA OG FAGURLITTA BÚNA, MEN HON ER EISINI UM VINALAG OG SAMANHALD OG UM AT FINNA SÍN RÆTTA LEIKLUT Í LÍVINUM. FØROYSKA ÚTGÁVAN BYGGIR Á SVENSKU BARNABÓKINA HARLEKIN EFTIR ULF LÖFGREN. ANNA KRISTIN BÆK HEVUR TÝTT OG UMSKRIVAÐ VIÐ ÍBLÁSTRI ÚR KLASSISKU PANTOMIMUNI COMMEDIA DELL'ARTE. KÁRI BÆK HEVUR GJØRT TÓNLEIKIN.

LISTAGREIN:
# A CAPPELLA

**Heiti:** BARZANGBAR – Trio a capella.

**Listafólk:** Lene Nørgaard, Kristian Skårhøj og Morten Mosgaard, sangarar.

**Málbólkur:** 1.–3., 4–7. ella 8.–10. flokkur.

**Longd:** Ein skúlatími.

**Fyrireiking:** Bólkurin sendir fyrireikingaruppskot.

**Krøv:** Eitt høli við streymveiting (til mikrofonir) og helst eitt ljóðanlegg.

**Tíðarskeið:** 28. apríl–2. mai 2014.





BARZANGBAR ER EIN SJÁLDSOM VOKALTRIO VIÐ TRIMUM HEILT SERSTØKUM SANGARUM, TRIMUM MIKROFONUM OG EINUM NÝTEKNOLOGISKUM ENDURTØKUTÓLI.
EIN KONSERT VIÐ BARZANGBAR ER EIN BLANDING AV IMPROVISERAÐUM SANGUM, SIÐBUNDNUM A CAPELLA SANGI OG SOLOBROTUM VIÐ FLØSKUM, KROPPUM OG BEATBOXING. BARZANGBAR FRAMFØRIR VIÐ IMPROVISATIÓN OG KREATIVITETI Á HØGUM STIGI.
BÓLKURIN NÝTIR OFTA DANS, DRAMA, SKEMT OG FRÁSØGN Í KONSERTINI. AT DRAGA INN ÁSKOÐARARNAR ER EIN STÓRUR PARTUR AV FRAMFØRSLUNI.
TÓNLISTALIGA KANN BARZANGBAR LÝSAST SUM EIN SAMANRENNING MILLUM HEIMSTÓNLEIK, DJASS, SOUL OG HIPHOP.

# SOLEIÐIS VIRKAR LISTALEYPURIN

- Hvørt skúlaár verður ein faldari við listatilboðum sendur skúlunum í øllum luttakandi kommunum.
- Skúlar og forskúlar kunnu bíleggja listafólkavitjan við at fylla út teldutøkt tekningarskjal á **www.listaleypurin.fo**.
- Verkætlanarleiðarin váttar bíleggingina og skipar fyri skúlavitjanum í samráði við skúla og listafólk.
- Eftirmetingarskjal verður sent kontaktlæraranum, ið hevur ábyrgd av, at næmingarnir sleppa til orðanna.

## VIT MÆLA TIL:

- at næmingaumboð eru við til at velja tey listaverk, ið skúlin biður um,
- at næmingaumboð taka ímóti listafólkunum og vísa teimum runt á skúlanum,
- at skúlin framhaldandi ger vart við síni ynski, hóast ógjørligt er at eftirlíka øllum ynskjum.

## VIT TAKA ÁBYRGD AV:

- at listaverkini eru góðkend av nevnd, sum umboðar bæði yrkislistafólk og lærarar,
- at skúlar í luttakandi kommunum um alt landið fáa vitjan,
- at virka fyri góðum og uppbyggjandi sambandi millum listafólk og skúla.

Skúlarnir gjalda einki fyri vitjanir. Norðurlandahúsið, Mentamálaráðið og kommunurnar bera allan kostnað.

## VIT MÆLA TIL:

- At lærarar gera listavitjanina til ein part av námsætlanini, sum verður latin inn miðskeiðis í september.
- At teldutøka tekningarskjalið fyri alt árið verður sent inn **áðrenn 15. september 2013**. Eftir hetta verður skráin løgd fyri árið.



Ivast ein skúli í, um kommunan er við í verkætlanini, mæla vit til at seta seg í samband við verkætlanarleiðaran, kommunustýrið ella avvarðandi kommunufelag.

## TEKNINGARSKJAL OG KUNNING Á WWW.LISTALEYPURIN.FO

## FYRISKIPARAR:

Norðurlandahúsið í Føroyum, Føroya kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya – við stuðli frá Mentamálaráðnum.

## UMSITING:

Listaleypurin við Hedvig Westerlund-Kapnas, verkætlanarleiðara,
Norðurlandahúsið í Føroyum, postrúm 1260, FO 110 Tórshavn, hedvig@nlh.fo, tel. 21 01 25.

Kommunusamskipan Føroya

FØROYA KOMMUNUFELAG

Mentamálaráðið

norden
Norðurlandahúsið í Føroyum

SENDISTOVAN